# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Kjartan Højsted, Føroya Fiskavirking:

## 35 ár á sama arbeiðsplássi

**4. februar 2004 vórðu fleiri av teimum, sum arbeiða hjá Føroya Fiskavirking í Havn, heiðraði. Orsøkin var, at tey høvdu ymiskar rundar starvsdagar.**

**Ein av teimum var Kjartan Højsted, sum hevur starvast á sama arbeiðsplássi í 35 ár**

Kjartan er 63 ára gamal og funningsmaður, sonur Mathildu, f. Petersen, og Eliesar Højsted, bæði úr Funningi.

Hann var sjómaður, áðrenn hann í 1967 byrjaði í minkagarðinum í Hoydølum, sum hoyrdi til Bacalao. Har arbeiddi hann í eini tvey ár. Síðan hevur hann arbeitt á fiskavirkinum Bacalao, sum bleiv yvirtikið av Føroya Fiskavirking í 1993. Hann arbeiðir sum eftirlitsmaður á virkinum og kannar og ger royndir av allari vøru, sum kemur inn á virkið, um hon er í samsvar við tey krøv, sum keyparin setur.

Kjartan er giftur við Annu, f. Eliasen, ættað av Slættanesi. Tey bygdu í Hoyvík í 1974, men í dag búgva tey í Funningi, har tey hava jørð. Kjartan hevur stóran áhuga fyri seyði og seyðahaldi, og brúkar hann nógv av síni frítíð til tað.

Anna og Kjartan eiga trý børn: Sigrið, Jón og Anniku, sum øll búgva í Hoyvík. Eisini eiga tey sjey ommu- og abbabørn.



*Kjartan Højsted (v.m.) fær her handað diplom og aðrar gávur frá Jan Øregaard, virkisleiðara á Føroya Fiskavirking*

### Gullbrúdleyp

Í dag 21. februar kunnu hjúnini Elly og Jóan Magnus Johannesen í Klaksvík halda gullbrúdleyp.

Dagurin verður hildin í Skálanum, har vælkomst verður frá kl. 18.

### 80 ár

Í dag, 21. februar, fyllir Magnhild í Vági, Klaksvík, 80 ár.

Dagurin verður hildin hjá dóttrini í Norðdepli.

### Dagurin

**21. februar. Sámuel.** Dagurin hildin til minnis um dómaran Sámuel, sum valdi og salvaði kongarnar Saul og Dávid.

Hebráiska navnið merkir *hoyrdur av Guði.*

**22. februar. Pætursmessa**. So mætur maður sum Pætur hevur tveir minningardagar í álmanakkanum, annar er *pætursmessa* 22. februar og hin er pætursøka tann 29. juni.

Dagurin í dag verður eisini róptur *pætursstólur* og sipar til halgisøguna um, at í tí kirkju í Antiokiu, har ápostulin gjørdist biskupur, varð sett eitt hásæti til hansara, so at øll kundu hoyra og síggja hann.

Pætur er eftir grikska orðinum *Petros*, sum merkir *klettur*.

*Jakob Jakobsen varð føddur hendan dagin í 1864*

**23. februar. Papias,** deyður umleið ár 150. Var biskupur í Hierapolis í Frígiu í Lítluásiu. Sigst at hava havt samband við ápostulin Filippus.

### Andlát

11. februar
Elsi Petersen, Oyrabakki, 26 ár.

13. februar
Rigmor Jacobsen, fødd Tórsheim úr Havn, 86 ár.
Jacoba Johannesen, Norðskála, 78 ár.
Kristian Sofus Davidsen, ættaður úr Æðuvík búsitandi í Canada, 101 ár.

14. februar
Jenny Jacobsen, vanliga nevnd Jenny á Støðini, Fuglafirði, 74 ár.
Edith Hansen, Tórshavn, 77 ár.

15. februar
Gunnleyg Joensen, Tórshavn, 72 ár.

16. februar
Maria Hermansen, Leynar, 91 ár.

18. februar
Magnhild á Toftini, Syðrugøta, 74 ár.

## Nógvar tunnur í KÍ-høllini



*Leygardagin klokkan 14 skipar Klaksvíkar Hornorkestur fyri tunnusláing í KÍ høllini*

**Aftur í ár verður KÍ-høllin karmur um árligu tunnusláingina, sum Klaksvíkar hornorkestur skipar fyri**

TÍÐINDASKRIV
*post@sosialurin.fo*

Leygardagin tann 21. februar klokkan 14 verður árliga tunnusláingin hjá Klaksvíkar Hornorkestri í KÍ høllini.

Einar 12 tunnur verða hongdar upp í høllini og síðani er bara at fara innar og luttaka. Í suðurendanum í høllini verður samstundis skipað fyri mat/køkutombola og burturluting. Kaffi verður til keyps.

Tað er Klaksvíkar Hornorkestur, ið stendur fyri tiltakinum, sum vanliga verður væl vitjað. Eini 600 til 700 fólk í alskyns føstulávintsbúnum møta upp. Serliga eru tað børn og ung, ið sláa, meðan foreldrini hyggja at.

Hornorkestrið heitir á fólk um at møta stundisliga, so øll fáa sítt pláss við tunnurnar. Øll luttakandi fáa bommposar og serligur bommpakki við heiðursmerki verður latin kattakongunum.

Áðrenn fyrstu sløgini verða sligin, fara Trøllapætur og Omman at vísa børnunum, hvussu ein ber seg at, tá tunnan skal sláast.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Bindur bundnaturriklæði á boripallinum

**Tá 55 ára gamla Armgarð segði vinum sínum, at hon ætlaði sær á ein boripall at arbeiða, hildu tey hana vera púra svaka. Men starvið, hon hevði havt í 10 ár sum portnari hjá múgvandi fólki, segði henni minni og minni, og nú vildi hon royna nakað heilt annað**

KONUBROT
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

– Tey mundu fingið sjokk, tá eg segði teimum, at eg hevði søkt starv á einum boripalli. Men tey hildu eisini, at tað var einastandandi, at eg tordi at fara, sigur Armgarð Juul Andersen, ið starvast sum terna umborð á boripallinum, Exerter hjá reiðarínum, Mærsk

Men tað forðaði ikki 55 ára gomlu Armgarð at gera dreym sín til veruleika. Hon tók øll tey trygdarskeið, ið vóru neyðug og helt avstað, tá hon fekk at vita, at hon hevði fingið starvið.

Á einum boripalli er gott at hava eitthvørt at tríva í á frívaktunum. Har er ber jú ikki til at fara í býin ella at vitja fólk, so løturnar kunnu gerast drúgvar, um ikki okkurt er at stytta sær stundir við.

Og Armgarð liggur ikki á løtu síðuni. Tá fýraftansklokkan á boripallinum ringir, tekur hon stokkarnar fram, og ikki so fá eru tey bundnaturrikløð, sum hon hevur fingið frá hondini.

Ikki breðgir hon burturúr ætt heldur. Omma hennara, sum hon er uppkallað eftir, Armgarð hjá Dáva í Gerðum, var tiltikin fitt í hondunum.

Armgarð starvast á einum av boripallunum hjá Mærsk og á skrivstovunum hjá reiðarínum í Esbjerg, sita fleiri av skrivstovukvinnunum í føroysku bundnaturrikløðum, sum hon hevur bundið.

Og ikki nóg mikið við tí, Armgarð hevur eisini gjørt føroysku ullintu undirklæðini kend í Hundested, har hon og maðurin nú búgva.

### Tómt lív

Í 10 ár starvaðist Armgarð sum portnari hjá ríkfólki í Vedbæk. Arbeiðið hjá einum portnara er at syrgja fyri, at húsið er reint, heinta børn og ansa teimum, tá familjan er burtur.

Tað ljóðar fínt, men er í veruleikanum júst tað sama, sum ein arbeiðsgenta. Men við tíðini leiddist hon av hesum arbeiði, sum segði henni minni og minni.

- Parið, eg starvaðist hjá vóru einastandandi fólk, men við tíðini føldist arbeiðið innihaldsleyst, og eg ynskti at royna nakað annað, sigur Armgarð.

Starvið hjá ríkfólkunum lærdi hana, at peningur er ikki alt, og at sonnu lívsvirðini hava einki við ríkidømi at gera.

- Hóast eg ikki átti so nógvar pengar, helt eg meg tó vera ríkari enn tey. Eg gjørdi nakað av sjálvbodnum arbeiði, eitt nú var eg vitjanarvinur. Tað gjørdi eg, fyri at finna javnvág í øllum tómleikanum, greiðir Armgarð frá.

### Mátti henda okkurt nýtt

Armgarð var komin hartil, at nú mátti henda okkurt heilt nýtt. Hon setti seg í samband við eitt undirfirma hjá Mærsk, sum eitur Danserve og søkti starv á boripallinum.

Men hevur tú sagt »a«, mást tú eisini siga »b«. Fyri at sleppa út á ein boripall eru ymiskar ásetingar, ið skulu lúkast, eitt nú trygdarskeið. Men hóast Armgarð ikki er heilt ung longur, so megnaði hon at gjøgnumføra skeiðini við ein glans.

- Eg eri terna umborð og høvuðsuppgáva mín er messan og køkurin og at syrgja fyri, at alt er har, sum skal vera. Eisini geri eg kømrini rein, tá vaktirnar skifta. Eg stórtrívist umborð, og eg elski mítt arbeiði, sigur hon.

Tað starvast um 70 fólk á pallinum, harav nakrir føroyingar.

### Svimur á sjónum

Fyri nøkrum árum síðani keyptu Armgarð og maðurin eina eigaraíbúð, sum liggur oman móti sjónum.

- Fjøran er okkara urtagarður, vit vildu hava sjógv og fiskalukt, sigur hon.

Hvønn morgun, summar og vetur, letur Armgarð seg í svimjidrakt og fer sær ein svimjitúr í kalda sjónum. Tað er kalt, men føroysku undirklæðini og stúkan gera, at skjótt er at fáa hita aftur í kroppin.

Flestu árini hava Armgarð og maðurin búð í Danmark, men nøkur ár, meðan Carl Aage sigldi við Vesturvón, búðu tey í Føroyum.

Tey eiga børnini, Mortan og Jessiku og ommu- og abbasonin, Rasmus.

- Vit ætla okkum ikki at verða verandi í Danmark, men ynskja at koma heimaftur til Føroya at gerast gomul, sigur Armgarð at enda í samrøðuni við Sosialin.



*Hevur tú sagt »a«, mást tú eisini siga »b«. Fyri at sleppa út á ein boripall eru ymiskar ásetingar, ið skulu lúkast, eitt nú trygdarskeið. Men hóast Armgarð ikki er heilt ung longur, so megnaði hon at gjøgnumføra skeiðini við ein glans*

**Tøkk**

*Hjartans tøkk verður veitt øllum tykkum, sum komu á dyr í Skálanum og heilsaðu mær, tá eg 30. januar fylti 60 ár.*

*Tøkk til Betesdakórið, 17 sangarar, yngru kvartettina og kvinnukórið Suð.*

*Eisini tykkum sum við gávum, blómum, fjarritum, teldubrøvum, telefonheilsanum – nær og fjar – mintust meg.*

*Sama tøkkin fevnir eisini um tær heilsanir eg fekk, tá eg nakrar dagar seinni gjørdist landsstýrismaður.*

*Tøkk fyri at tit gleddu meg hesar dagar.*

*Hjartaliga tøkk*
**Jógvan við Keldu**

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Petra Ingigarð Sørensen**
Tórshavn

varð jarðað.

En serstøk tøkk til starvsfólkið á Lágargarði, sum vóru um hana.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Lágargarð og til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Amandus**